# Øll 18 á vali



*Allir veljarar í Gásadali á vali, kundi formaðurin í valstýrinum, Dávur Joensen (vinstrumegin) staðfesta. Hann prátar her við Karl Mikkelsen*

**Tað man hoyra til undantøkini, at allir veljararnir á einum valstaði eru á vali. Tað hendi í øllum førum í Gásadali leygardagin.**

VALSTAÐ

*Orð/mynd: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Gásadalur:** Í bygdini høvdu 18 fólk valrætt, og tá úrslitið av valinum í Gásadali varð almannakunngjørt kl. 20:42 vísti tað seg, at øll 18 høvdu verið á vali.

- Vit vita ikki altíð, hvussu nógv fólk koma á val. Onkutíð sita vit bert og bíða eftir teimum seinastu veljarunum líka til kl. 8.

- Og onkutíð greiða tey heldur ikki atkvøðu, sigur formaðurin í valstýrinum, Dávur Joensen.

Leygardagin var kortini øðrvísi, har øll 18 vóru á vali.

Tá Sosialurin vitjaði valstaðið í Gamla Skúla seinnapartin høvdu 9 fólk verið á vali. Og júst meðan vit vóru har, kom tann tíggjundi at velja.

-Eg havi valt Fólkaflokkin - Jørgin, segði Karl Mikkelsen.

Tað sama høvdu tey flestu av bygdarfólkum hansara eisini gjørt. Av teimum 13 atkvøðunum til flokkin átti formaðurin í flokkinum tær 12.

Hinar atkvøðurnar býttu seg soleiðis: Tjóðveldi fekk tríggjar, meðan Javnaðarflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin fingu hvør sína. Tað var ein meiri enn við valið í 2004.

Sambandsflokkurin, Miðflokkurin og Miðnámsflokkurin eiga framvegis ongan góðan í Gásadali.





## SKIPSASSISTENTUR TIL NORRÖNU

Smyril Line søkir eftir skipsassistenti til Norrönu. Vit bjóða honum/henni eitt fjølbroytt starv umborð á flaggskipinum í føroysku ferðavinnuni.

Aftrat góðum starvstreytum, bjóða vit góða løn og góða frítíðarskipan. Ein máni til arbeiðis, gevur ein mána frí – við løn.

**Førleikakrøv skipsassistent:**
- Vera hegnigur, ágrýtin og røkin
- Kunna arbeiða sjálvstøðugt
- Góð samstarvsevni

**Arbeiðsuppgávur:**
- Alt vanligt skipsarbeiði
- Høvuðsuppgávan er omandekks viðlíkhald, so sum máling og reingerð.

**Setanartreytir**
Setanartreytir sambært sáttmála millum avvarandi fakfelag og Føroya Reiðarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við møguligum viðmælum skulu sendast til:
crew@smyril-line.fo ella sendast í brævbjálva til Smyril Line.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi **30. januar 2008**.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Heðin Mortensen, maskinstjóra á:
+298 34 48 46 ella
crew@smyril-line.fo

Smyril Line varð stovnað í 1982, og er í dag ein altjóða fyritøka við skrivstovum í Føroyum, Íslandi, Noreg, Týsklandi og Danmark. Umframt egnar skrivstovur, hevur felagið eisini samstarvsfelagar í meginpartinum av evropeiska meginlandinum og restini av útheiminum.

SMYRIL LINE · J. BRONCKS GØTA 37 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN · TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO

WWW.SMYRIL-LINE.FO